## Dávur foldar seg út á Tvøroyri

**Sunnudagin fer Dávur í Tjørnuvík at siga frá einum longum og livandi lívi í gamla kongliga handlinum á Tvøroyri**

FRÁSØGN

Sunnudagin fær gamli kongligi handilin á Tvøroyri forvitnisliga vitjan.

Tá fer Dávur í Tjørnuvík at siga frá einum longum, hendingaríkum og livandi lívi í handlinum hjá Thomsen á Tvøroyri, sum nú er pubb og kafé.

Hesa seinastu tíðina hevur hann verið á rundferð kring landið og sagt frá. Hetta er ein rundferð, sum gongur undir heitinum Dávur á ferð og sunnudagin klokkan 14 fer hann at siga frá í Thomsen-handlinum á Tvøroyri.

Dávur í Tjørnuvík er 94 ára gamalur og hann hevur sera gott minni. Har, hann higartil hevur verið og sagt frá, hevur nógv fólk verið og lurtað og tað er ikki so løgið, tí Dávur er er ein meistari at siga frá og hann livir seg av fullum huga inn í sínar frásagnir og fólk sita sum undir lestri, tá ið hann foldar seg út.

Og í einum longum og hendingaríkum lívi, hevur Dávur upplivað mangt, bæði á sjógvi og landi so evnini at práta um, tróta ikki.

Í fjør skrivaði Sveinur Ísheim Tummasson bók, har hann letur Dáva siga frá um síni barnaár og fyrstu manndómsár.

-Áki-

## Føstulávintshald í Hvalba

**Í Hvalba fara tey at halda føstulávint hetta vikuskiftið, bæði fyri vaksnum og børnum og leygarkvøldið spælir sera vælumtókta orkestrið, Lagamenn, til dans**

FØSTULÁVINTSHALD

Í Hvala plaga tey at gera eitt sindur burturúr føstulávint og tað fara tey at geraaftur í ár.

Sostatt verður føstulávintshald í Hvalba hetta vikuskiftið, bæði fyri børnum og vaksnum

Tað er Bóltfelgið Royn, sum skipar fyri og lagt verður til brots longu leygardagin kl. 15, táið tey vaksnu sláa tunnu í Roynhøllini.

Klokkan átta um kvøldið verður veitsla, har okkurt verður til matna og tá slær konufólkið tunnu.

Eftir veitsluna er almennur dansur alla náttina, har seravælumtókta dansiorkestrið, Lagamenn, spæla tl dans.

Mánadagin verður so tiltak í Ronhøllini fyri børnum, har tey slá bæði pott og tunnu, alt eftir aldri

Tiltakið leygardagin kostar 200 krónur fyri tunnuslátttur og dans, men atgongmerkið til almenna dansin aftaná kostar 120 krónur

-Áki-

## Tvørabørn sláa tunnu hjá donsku sjóverjuni

**Sunnudagin sleppa tvørabørn umborð á verjuskipið at sláa tunnu. Kattakongarnir fáa stórfingnan og forkunnugan vinning**

TUNNUSLÁTTUR

Tvørafólk og danska sjóverjan hava leingi havt eitt heilt serligt tilknýti. Tilknýtið hevur verið so tætt, at Tvøroyrar kommuna enntá ættleddi verjuskipið Veðrin, tað tíð tað var.

Ein partur av hesum felags tilknýti hevur verið, at onkrir fastir siðir hava tikið seg upp. Ein av hesum siðum er, at á føstulávint liggur verjuskipi inni á Tvøroyri og tá verður skipað fyri tunnuslátttri umborð.

Og tað verður tað aftur í ár.

Sostatt bjóðar manningin á verjuskipunum børnum á Tvøroyri umborð at sláa tunnu sunnudagin kl. 14.

Tað plaga at vera nógv børn umborð og sláa tunnu og nógv av teimum hava verið stuttliga ílatin í føstulávintsklæðum av alskyns slagi og tað vænta tey eisini í ár.

Og sambært kunningarstovuni á Tvøroyri kunnu kattakongarnir vænta sær stórfingna og forkunnuga virðisløn.

- Kattakongarnir sleppa ein túr við tyrluni hjá sjóverjuni og tað er ikki eiti á vinningi, heldur Kunningarstovan. -Áki-

# Skutu við skørpum eftir føroyskum djóralæknum

**Djóralæknarnir í Føroyum stóðu fyri skotum í Løgtinginum mikudagin tá ið teir vórðu skuldsettir fyri at misbrúka støðuna viðvíkjandi fuglakrími til at kroysta pengar burturúr tí almenna**

TILBÚGVING
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Bæði Óli Breckmann og Poul Michelsen løgdu eftir føroysku djóralæknunum í tinginum mkudagin. Djóralæknarnir eru ómoralskir og ósosialir og teir seta landsins trygd í vanda, er niðurstøðan hjá teimum báðum fólkafloksmonunum*

– Føroyskir djóralæknar eru bæði ómoralskir og ósosialir og teir seta trygdina hjá samfelagnum í vanda.

Hetta var skoðsmálið, sum djóraæknarnir fingu frá fólkafloksmonnum á løgtingi mkudagin.

Tað var Finnur Helmsdal, løgtingsmaður, sum vildi hava Bjarna Djurholm, landsstýrismann, at greiða frá, hvussu gekst við royndunum at semjast um eina vaktarskipan fyri djóralæknarnir, so at teir altíð kundu vera tilbúnir í sambandi við djórasjúkur av ymsum slagi, eitt nú fuglakrím, men tað kundi eisini vera í sambandi við ILA ella aðrar sjúkur.

Hetta fekk tveir fólkafloksmenn at skjóta við skørpum eftir djóralæknunum og teir skuldsettu djóralæknarnir bæði fyri at seta trygdina hjá samfelagnum í vanda og fyri at misbrúka støðuna viðvíkjandi fuglakrími til at royna at kroysta pengar burturúr tí almenna niður í engar lummar.

Poul Michelsen helt, at tað hóvaði honum sera illa, at djóralæknar ikki kundi traðka til, tá ið brúk var fyri tí, uttan at skula hava penagar afturfyri.

Hann helt, at tað var heilt ótrúligt, at djóralæknarnir skuldu fáa seg til at seta samfelagsins trygd ívanda við at nokta fyri at bjóða seg fram, tá ið brúk var fyri tí, uttan at teir skuldu hava pengar afturfyri.

Men var Poul Michelsen harður í orðum, var partamaður hansara, Óli Breckmann, enn meiri hvassorðaður og eirindaleysur í sínum dómi yvir djóralæknarnar.

Men hann kallaði framferðina hjá djóralæknunum fyri beinleiðleiðis pengakúging, sum vit lesa um í kriminalbókum og síggja í filmum.

– Hetta er ómoralskt av hundunum til og ósosialt ímóti teimum, sum altíð mugu vera klára at fara til arbeiðis fyri onga løn, tá ið á stendur, eitt nú bjargingarfeløgini.

Men tað, sum hann helt vera ringasta av øllum, er at fuglakrím er eitt "mannaskapt fantasiprojekt av einum dómadags-scenarii".

– Fuglakrím er líka sansaleyst sum hetta tvætlið um at vit skulu brenna upp av ozonlagnum, sum brádliga hvørvur, halda vit ikki uppat at brúka spraydósir undir armin og hetta møsnið um at hita jørðina, halda vit ikki uppat at koyra í bili.

– Ørskapur, alt sum tað er, skoytti Óli Breckmann upp í.

Tó helt, at vit sjálvandi skulu vera til reiðar til eina heimsfarsótt, men hann mælti kortini til, at vit ikki missa fótafestið, men ansa eftir, hvussu vit brúka pengarnar.

Finnur Helmsdal ávaraði teir báðar ímóti at leggja ein heilan samfelagsbólk undir at nassa og at misbrúka støðuna til egnan fyrimun.

Hann sipaði til, hvat apotekarar og læknar og onnur fingu, fyri sama slag vaktarskipanir, men mnurin var, at tey vóru limir í donskum fakfeløgum, ella høvdu professionellar danir at samráðast fyri seg, men tey, sum vóru í føroyskum fakfeløgum, fingu durafjórðingin.

Hann vísti annars til, at lógim áleggur at hava eftirlit við øllum livandi djórum í sambandi við djórasjúkur, men hetta eftirlitið klára vit ikki, tí vit ikki unna føroyskum fakfeløgum teirra rættindi.

Bjarni Djurholm helt, at tað er neyðugt hetta at fáa avgreitt, tí missir ES álitið á okkum í hesum sambandi, tí vit ikki hva eina nøktandi tilbúgving, er tað eitt álvarsmál.

Annars hevur landsdjóralæknin átikið sær av hava hesar vaktirnar, hóast tað hoyrir undir Heilsufrøðiligu Starvsstovuna.

Tað hevði verið ein vanlukka fyri Føroyar, skoytti Finnur Helmsdal upp í, tí tað kann enda við, at vit ikki sleppa at útflyta fisk til ES.

# Hugna-flogbóltur á Tvøroyri

**Næsta leygardag verður skipað fyri hugnaligari flogbóltskapping fyri motionistar á Tvøroyri**

HUGNALIG SAMVERA

Leygardagin 4. mars skipar Tvøroyrar Bótlfelag fyri almennum hugna-flogbólti í ítróttarhøllini á Tvøroyri. Talan er um eina kapping fyri blandað lið og byrjað verður klokkan 13.

Tað skulu vera seks leikarar á vøllinum í senn og minst helvtin av teimum skulu vera konufólk. Leikararnir skulu verða minst 30 ára gamlir, men kortini er loyvt at hava ein leikara við, sum er minst 25 ár. Annars er eisini loyvt at hava seks eykaleikarar á hvørjum liðið, so at hvørt liðið kann verða mannað við 12 spælarum. Men av tí, at hetta er ein hugnakapping, sum mest er ætlað motionistum, er ikki loyvt at hava spælarar við, sum hava spælt í landskappingini seinastu trý árini. Hvørt lið kemur at spæla minst fýra dystir.

Luttøkugjaldið verður 400 krónur fyri, men tá fæst eisini okkurt til matna og okkurt leskiligt at drekka á eini hugnaløtu, sum verður leygarkvøldið klokkan 21.00, ella har á leið.

Tey, sum hava hug at vera við, kunnu siga frá hjá Chris N.Petersen á telefon 22 19 34 í seinasta lagi nú leygarkvøldið.

-Áki-